# Milan vann HM

Við stórspæli frá Kaka tryggjaði Milan sær sunnumorgunin heitið sum heimsins besta fótbóltsfelag. Í einum til tíðir dramatiskum dysti vunnu teir 4-2 á argentinska Boca Juniors. Kaka, sum herfyri varð kosin besti spælarin í Europa, og sum væntandi verður kosin heimsins besti spælari í næstum, sýndi satt stórspæl. Umframt at skora eitt mál sjálvur, legði hann eisini upp til bæði málini hjá Inzaghi í sigrinum.



# Maldini gevst

Tá hetta kappingarárið er av, setir italski Paolo Maldini gaggurnar á hillina. Maldini spældi sín fyrsta dyst fyri AC Milan sum bara 16 ára gamal, og nú – nærum 23 ár seinni – spælir hann framvegis fyri sama felag. Men alt fær ein enda, og eftir finalusigurin á Boca Juniors í kappingini um HM-heitið fyri feløg staðfesti Maldini, at nú er skjótt liðugt. – Í juni steðgi eg, og eg haldi meg ikki hava orsøk at angra nakað. Í løtuni er tað tó eitt stríð, tí eg havi nakað av pínu, men eg havi tað framvegis stuttligt á vøllinum, segði hann við italskar miðlar eftir finalusigurin sunnumorgunin.

# Oddaliðini vunnu

**Bæði SÍ og ÍF vunnu tryggar sigrar um vikuskiftið, soleiðis at tey styrktu um oddastøðuna**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eins og hjá monnunum, so er SÍ á odda í meistaradeildini hjá kvinnum. Um vikuskiftið ferðaðust tær til Suðuroyar, har TB í løtuni er í ferð við at byggja sær eitt nýtt lið upp, og í Trongisvági megnaði heimaliðið eisini at bíta frá sær eina løtu.

SÍ hevði annars tikið fyrsta settið í stórum stíli, men tá tær á heimaliðnum tveittu virðingina fyri borð, gav hetta at bíta. Soleiðis tók TB sær av næsta settinum, og tó at SÍ kortini vann væntaða sigurin, so varð hetta ikki gjørt við somu sannførandi settúrslitum, sum fyrsta settið kundi bent á.

Og á Kambsdali hevði ÍF vitjan av KÍF, sum í ár liggur passaliga lunkað miðskeiðis á stigatalvuni. Móti væl upplagda heimaliðnum megnaði KÍF tó ikki at gera tær stóru skreytirnar, og gjørdist talan tí um sannførandi 3-0 sigur til heimaliðið, sum ongan tíð lætt nakran iva vera um, hvar stigini skuldu fara.



*KÍF hevði ikki teir heilt stóru møguleikarnar, tá tær leygardagin vitjaðu hjá einum sera væl uppløgdum ÍF-liði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Úrslitini

**Meistaradeild kvinnur**
ÍF-KÍF 3-0 (25-14, 25-16, 25-15)
TB-SÍ 1-3 (10-25, 25-23, 20-25, 17-25

**Meistaradeild menn**
ÍF-Mjølnir 3-1 (22-25, 25-21, 25-17, 25-21)

# ÍF er avbjóðarin



*Fuglfirðingar vunnu seg aftur í dystin, hóast tað eina løtu bendi á, at Mjølnir skuldi fara avstað við stigunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Á Kambsdali megnaði Mjølnir ikki at taka stig, og tí er tað nú ÍF, sum er avbjóðarin hjá SÍ**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Meðan SÍ hevur verið at kalla einaráðandi í manskappingini higartil, so hava menninir hjá Mjølni og ÍF kappast um, hvør teirra skal bjóða sørvingunum av í oddinum.

Undan dystinum leygardagin høvdu liðini bæði seks stig, og í longum løtum gjørdist dysturin júst eins spennandi, sum roknast kundi við.

Mjølnir var liðið, sum fekk betru byrjanina, men spakuliga tók ÍF yvir. Og tó at Mjølnir royndi at muta ímóti, so gjørdist talan til enda um ein hampuliga tryggan 3-1 sigur til fuglfirðingarnar.

Við átta stigum eru tað nú teir, sum eru næstir SÍ, nú farið verður í vetrarfrí.

Samstundis er stigatalvan broytt, nú Fram endaliga hevur strikað seg úr kappingini. Í oddinum gjørdi hetta tó ikki tann heilt stóra munin, tí Fram hevði tapt allar sínar dystir móti trimum teimum fremstu liðunum. Men við bara fýra liðum eftir á talvuni verður restin av kappingarárinum heldur tunnligt.

## Besta kastið í fýra ár

**Longu í fyrstu kastikappingini á árinum kastaði Heri Ziska sítt besta kast í fýra ár**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta kastikappingin hetta kappingarárið varð hildin í oysandi regni við Eysturskúlan í Havn leygardagin.

Á skránni vóru hamari, diskos, spjót og kúla, og í fleiri førum varð talan um framúr góð úrslit. Bæði Randi Kúrberg og Heri Ziska kastaðu sína bestu byrjan upp á eitt kappingarár nakrantíð, og serliga gjørdi Heri vart við seg í diskoskasti. Kastið hjá honum upp á 44,44 metrar er tað longsta, sum hann hevur kastað, síðani hann í 2003 vann gull í oyggjaleikum á Guernsey.

Sjálvur sigur Heri, at tað uttan iva er miðvísa venjingin síðani kappingarlok í august, og tað, at hann nú er sloppin undan argandi skaðum, sum eru høvuðsorsøkirnar til góða kastið. Men hóast tað enn eru 19 mánaðir til næstu oyggjaleikir, so fær tað illa verið annað enn hugaligt, at eitt av bestu føroysku kortunum í frælsum ítrótti longu nú sýnir slík avrik.

Úrslitini í kastikappingini vóru hesi:

**Hamarkast**
Heri Ziska Bragdið 45,84 m
Randi Kúrberg Bragdið 34.35 m

**Diskoskast**
Heri Ziska Bragdið 44,44 m
Meifríð Hansen Bragdið 22,80 m

**Kúlustoyt**
Randi Kúrberg Bragdið 8,48 m

**Spjótkast**
Randi Kúrberg Bragdið 26,78 m
Meifríð Hansen Bragdið 24,29 m